# Heim & Skúli
# Aðalfundur 3. sept. 2022

# ”Eitt sindur um ætlaðar broytingar í fólkaskúlalógini”

FØROYA LÆRARAFELAG

# Eitt sindur um Føroya Lærarafelag

# Viðtøkur

§ 1. Endamál Føroya Lærarafelags er:

- at røkja starvsligu, lønarligu og uppalingarligu áhugamálini hjá fólkaskúlalærarum í Føroyum,
- at styrkja og stimbra samanhaldið,
- **at arbeiða fyri menning fólkaskúlans og**
- **at fremja vælskipaðan skúlaskap á kristnum grundarlagi í Føroyum.**

# Felagið

- **Nevndin**
  - Jacob Eli S. Olsen *formaður*
  - Tórhallur við Gil *næstformaður*
  - Jona Højsted *kassameistari*
  - Bergur Samuelsen *skrivari*
  - Eyðbjartur S. Skaalum *nevndarlimur*
  - Tiltakslimir: 1. Annbritt Toftegaard og 2. Augusta E. Petersen
- **Álitisfólk**
  - 31 álitisfólk, vald í einum skúla ella einum skúlaøki
- **Starvsfólk**
  - Jacob Eli S. Olsen, formaður
  - Poulina Jacobsen, skrivari
  - Sólja í Ólavsstovu, løgfrøðingur

- Felagshúsið - Pedda við Stein gøta 9
  - Miðhædd: formaður, skrivari og løgfrøðingur
  - Kjallari: kømur til limir at leiga



- Bókadeild Føroya Lærarafelags
  - Heldur til á loftinum í Pedda við Stein gøtu 9

- Pf. Bókamiðsølan
  - Bókahøllin á Hjalla



*tíðindi hvønn yrkadag á [www.skulabladid.fo](http://www.skulabladid.fo)*




Skúlablaðið
- 6 útgávur um árið - Útgivið síðan 1930 (royndarblað í 1923)

STROK LÆRARAFELAGIÐ SKÚLABLAÐIÐ BÓKADEILDIN BÓKAKLUBBIN BÓKAMIÐSØLAN

# Føroya Lærarafelag

Lærarafelagið - Forsíða Felagið Sáttmálar og semjur Fólkaskúlin Spurningar og svar Veðurlagsvirðisløn




## Veðurlagsvirðisløn Føroya Lærarafelags

Vinnarin av Veðurlagsvirðisløn Føroya Lærarafelags er ein skúli, ið hevur skarað framúr í arbeiðinum at geva børnum og ungum áhuga fyri og innlit í veðurlagsavbjóðingar og loysnir á veðurlagsavbjóðingum.

Tín skúli kann eisini søkja.

Ungdómurin gongur á odda fyri broytingum kring heimin. Lærarafelagið vil, at føroyski skúlin í størri mun eggjar børnum og ungum at arbeiða við veðurlags- og umhvørvisavbjóðingum. So at børn og ung fáa øktan áhuga í at finna loysnir.

http://www.lararafelag.fo/ve%C3%B0urlagsvir%C3%B0isl%C3%B8n-1


FØROYA LÆRARAFELAG
betri
25.000,00
Tórshavn
20.06.20
Fimmogtjúgutúsund 00/100
Eysturskúlin
Veðurlagsvirðisløn
Føroya Lærarafelags
VEÐURLAGSPRÓGV


betri
Upphædd á kr.: 25.000,00
Staður: Tórshavn
Dagfesting: 08.05.21
Krónur: Fimmogtjúgutúsund 00/100
Móttakari: Skála Skúli
Bestu heilsanir: Veðurlagsvirðisløn
Føroya Lærarafelags
VEÐURLAGSPRÓGV


betri
25.000,00
Tórshavn
30.04.22
Fimmogtjúgutúsund 00/100
Skála Skúli
Betri Pensjón
MATUR

# Fólkaskúlalógin
## §2. Endamálsorðingin

**§ 2.** Uppgáva fólkaskúlans er við *atliti at tí einstaka næminginum* og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

*Stk. 2.* Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir *møguleikar, sum eru í felagsskapinum*.

*Stk. 3.* Fólkaskúlin skal *í sátt og samvinnu við foreldrini* hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

**§ 3.** Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.

*Stk. 2.* Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.

# Úrdráttur úr Endamálsorðing fólkaskúlans

### *Stk. 1*

kunnleika,

fimi,

arbeiðshættir

málbúnar,

fjølbroyttu persónligu menningini.

### *Stk. 2*

skapa líkindi fyri:
uppliving
virkishugi
djúp-hugsan

næmingarnir menna
sína sannkenning,
sítt hugflog
hug til at læra,

næmingar venja síni
evni til
sjálvstøðuga meting,
støðutakan

búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

### *Stk. 3*

geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling.

menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og aðrar mentanir

samspæl manna við náttúruna

búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag.

Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

# Røkkur fólkaskúlin endamálinum?

Hvørjar broytingar kundu verið viðkomandi í fólkaskúlalógini?

# Ætlaðar broytingar í fólkaskúla-lógini

# Arbeiðssetningur hjá bólkinum, sum viðgerð ætlaðar broytingar í fólkaskúlalógini

- Evnini, sum verða viðgjørd í fyrstu syftu, eru:
  - Tíma- og lærugreinabýtið
    - Í mun til drúgva skúladagin hjá næmingunum
  - Floksstødd
    - at lækka floksstøddina
  - handaverk og list
    - menna handaligu og listarligu lærugreinarnar

## Reglur um tíma- og lærugreinabýtið

| | Lærugrein | 1.fl | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Hugvísindaligar lærugreinir** | | | | | | | | | | |
| 1 | Kristnikunnleiki | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 16 |
| 2 | Føroyskt | 11* | 11 * | 9* | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 64 |
| 3 | Danskt | | | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 27 |
| 4 | Enskt | | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 21 |
| 5 | Søga/samtíð | | | | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 10 |
| 6 | Samfelagsfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| | **Náttúruvísindaliga lærugreinir** | | | | | | | | | | |
| 7 | Støddfrøði | 7 | 7 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 50 |
| 8 | Heimstaðarlæra Náttúra og tøkni | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | | | | |
| 9 | Landalæra | | | | | | | 1 | 2 | 2 | 5 |
| 10 | Lívfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| 11 | Alis/evnafrøði | | | | | | | 2 | | | 2 |
| | **Ítróttur** | | | | | | | | | | |
| 12 | Ítróttur | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 17 |
| | **Handaverk og list** | | | | | | | | | | |
| 13 | Sangur og tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki | | | | | | | | | | |
| | | 2 | 2 | 4 | 5 | 4 | 5 | 2 | | | 25 (24) |
| | **Vallærugreinir** | | | | | | | | | | |

# Tíma- og lærugreina-býtið

- Vallærugreinar koma afturat hesum
- Landsstýrismaðurin ásetur tíma- og lærugreinabýtið
- Hvørjar broytingar eru hóskandi?

# Tíma- og lærugreinabýtið
# - "drúgvi skúladagurin hjá næmingunum"

Tvey lyklaorð í undirvísingini:

**Stuttligt** **Langligt**

- ið varir leingi (so at ein keðir seg) (sprotin.fo)

- Námsætlan
- Faklig krøv
- Arbeiðshættir
  - Handaligt?
  - Listarligt?
  - Egin áhugi?
  - Kannandi?
  - Vitjanir?

- Innihald í skúlanum?
- Umstøður í skúlanum?

Hvat er ein:

- Langur skúladagur?
- Stuttur skúladagur?

Skúlin má fáa umstøður til arbeiðshættir, so tíðin kennist stutt (stuttligt), heldur enn virksemi, sum kennist langligt

"Skúlin eigur at fáa betur møguleikar at laga undirvísingina til næmingarnar. Fáa meira pláss fyri arbeiðshættum, sum tíðin kennist stutt (stuttigt)"

## HVØNN TÝDNING HEVUR TÍMABÝTIÐ Í HESUM?

Nøkur øki, ið hava týdning í skúladegnum:

- Námsætlan
- Smærri næmingabólkar – fleiri lærarar
- Hølir
- Arbeiðshættir

# Floksstødd

- AT LÆKKA FLOKSSTØDDINA

§ 20 í fólkaskúlalógini ásetur at, “við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 næmingar.”

> “159 flokkar í fólkaskúlanum hava 20 næmingar ella fleiri næmingar, og er býtið er:
> 87 flokkar, sum hava 20 – 23 næmingar og
> 72 flokkar, sum hava 24 – næmingar ella fleiri”
>
> UMMR, Juni 2021

Hildu vit okkum til fólkaskúlalógina, so høvdu nógvir flokkar longu færri næmingar - Tað kundi verið eitt fyrsta stig, meðan vit bíða eftir broytingum í fólkaskúlalógini.

# Handaverk og list

## Menna handaligu og listarligu lærugreinarnar

Arbeiðið er komið stutt við hesum

- Handaverk og list er í skúlanum bæði sum lærugrein og sum arbeiðsháttur í øðrum lærugreinum

# Avbjóðingar í fólkaskúlanum og møguligar loysnir

- Fleiri lærarar fyrstu skúlaárini
- Trivnaður og sálarheilsa hjá børnum og ungum
  - Geva flokslærarum og heilsusystrum meira tíð
  - Sálarfrøðingar í skúlan?
- Stórir flokkar og næmingabólkar
  - Smærri flokkar og tveir lærarar í flokkin
- Námsætlanin - ov nógv bóklig krøv
  - Tørvur á dagførdum námsætlanum
- Børn og ung sum ikki trívast í skúlanum og í lívinum
  - Meira tíð at vera um hesi í skúlanum
- ...

# Avbjóðingin í fólkaskúlanum

## Krøv

- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …

## Tørvur

- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …
- …

### Játtan

- …
- …
- …

Krøvini og tørvurin eru størri enn játtanin

Takk fyri